## Gongutúrur týskvøldið



Týskvøldið 24. juli, kl. 19.00, fer Gongubólkurin hjá Felagnum Tórshavn at ganga fram við tí, sum eftir er av okkara ´kinesiska múri´, sum Petur Háberg kallar Stóragarð í sínum Hugbirtingum í 1981. Á longum strekkjum er garðurin illa farin, í støðum er hann horvin, og lata vit bara standa til, standa bert fáar leivdir eftir, har privat fólk í Havn enn virða søguna og sínar forfedrar. Túrurin byrjar kl. 19.00 Yviri við Strond, við Válgaravík, sum liggur eitt sindur heimari enn har Tórgarðsgøta kemur oman í Vegin Yviri við Strond.

## Sluppu undan deyðarevsing

Tær fimm bulgarsku sjúkrasystrarnar og tann palestinski læknin, sum vórðu dømd til deyða, hava nú fingi dómin skerdan niður til lívlanga fongsulsrevsing. Dómin fingu tey, eftir at tey eru løgd undir at hava sproyta HIV inn í fleiri hundrað børn. Skerjingin av dóminum fór fram í gjár, eftir at hægsti rættur viðgjørdi málið av nýggjum.

# Til reiðar at finna eina loysn

**Vit í Fólkaflokkinum halda, at lógin er ov stirvin. Vit vilja fegnir verða við til at finna eina loysn á málinum um Sunbeam, men vit bíða eftir einum útspæli frá Bjørn Kalsø, sigur Jørgen Niclasen, fyrrverandi fiskimálaráðharri**

FISKILOYVI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fólkaflokkurin, sum er ein av samgongupartnarunum hjá sitandi fiskimálaráðharra, Bjørn Kalsø, er ikki avvísandi at finna eina loysn á málinum um fiskiloyvið hjá Sunbeam.

- Vit vilja fegnir verða við til at finna eina loysn á hesum málinum. Eisini ti vit meta, at lógin sum hon virkar í dag, er ov stirvin. Tíðirnar broytast og tí er eisini neyðugt, at vit tillaga lógirnar samsvarandi, sigur Jørgen Niclasen, fyrrverandi figgjarmálaráðharri og limur í vinnunevndini hjá løgtinginum.

Hann sigur, at tað sjálvandi ikki ber til at greina ein fiskivinnupolitikk út frá einum einstøkum dømi, men tað, sum var rætt í 90-unum, nýtist ikki neyðturviliga at vera rætt í dag.

- Tað er okkurt, sum bendir á, at útrokningarmátin, sum samsvaraði ógvuliga væl við veiðina í 90-árunum, átti at verið endurskoðaður, tí tað er ikki vist, at hann er hóskandi sum útrokningarháttur í dag, sigur Jørgen Niclasen.

Tað var hann sjálvur, sum í síni tíð sum fiskimálaráðharri innførdi BT ferðir maskinrorku sum útrokningarhátt fyri trolarar og volumen (longd x breidd x dýpd) fyri húkaflotan. Seinni vísti tað seg, at bruttotons var ein undarlig útrokning, og tí broytti Jacob Vestergaard útrokningarháttin til volumen ferðir maskinorku í staðin.

- Tað kann vera, at vit skuldu nýtt tógmegina heldur enn støddina á maskinuni sum útrokningargrundarlag, heldur Jørgen Niclasen.

Í málinum um Sunbeam eru fleiri ymsir faktorar inni í myndini, men Jørgen Niclasen heldur, at tað átti at borið til at funnið eina loysn á málinnum. Sum eitt dømi um stirvnaðin í lógini nevnir hann, at tað átti at verið møguligt hjá fleiri reiðaríum at uppkeypt eitt loyvi, sum teir síðani kundu býtt í fleiri lutir, og harvið økt um egna veiðiorku.

Vit vilja finna eina loysn, men treytin er sjálvandi, at hetta verður gjørt innan fyri galdandi fiskivinnulóg – og sum nevnt bíða vit eftir einum útspæli frá fiskimálaráðharranum, sigur Jørgen Niclasen.



*- Lógin er ov stirvin, og tí eigur hon at verða tillaga broyttu umstøðunum, sigur Jørgen Niclasen, fyrrverandi fiskimálaráðharri*

# Harmiligt um skipini fara

**Vit hava roynt at hjálpt til við eini loysn, so skipini kunnu verða verandi á fjørðinum. Men tað ber ikki til at benda lógina, sigur Jóhan Dahl, løgtingsmaður**

FISKILOYVI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Sunbeam fekk upprunaliga innflutningsloyvi í staðin fyri Roc Amadour. So tað snøggasta hevði verið, um fiskiloyvið varð flutt millum tey bæði skipini, so kundi avlops veiðiorkan verið flutt yvir á Sancy, um tað ber til sambært lógini.

Tað sigur Jóhan Dahl, partamaður hjá Bjørn Kalsø, og løgtingsmaður fyri Suðuroynna. Og sjálvandi vágbingur eisini.

Hann hevur verið við í málinum alla tíðina, og hevur roynt at gera sína ávirkan galdandi. Men hann viðgongur samstundis, at skal ein loysn finnast, so má hon finnast innan lógarinnar karmar. Tí tað ber ikki til at benda og snara lógina eftir vild.

- Mann hevur alla tíðina verið greiðir yvir, at Sancy var ov lítið skip til at kunna verða skift út við Sunbeam, eisini um Topas kom inn í myndina. Tað visti reiðaríið jú eisini framman undan, sigur Jóhan Dahl.

Hann viðgongur, at tað hevur verið ógvuliga trupult at finna eina loysn á hesum málinum, men hann heldur, eins og Jørgen Niclasen úr Fólkaflokkinum, at tað átti at borið til sambært lógini, hjá fleiri reiðaríum at keypt veiðiloyvi frá einum skipi og síðani býtt hetta út á keypandi reiðaríini. Tað hevði skapt ein størri fleksibilitet í lógini.

Løgtingsmaðurin í Vági heldur, at helt reiðaríið fast við uppruna ætlanina við Roc Amadour, og heimilar lógin, at restorkan verður flutt yvir á Sancy, so kundu vágbingar fingið tvey góð skip fyri tey gomlu.

- Málið er ikki endaliga avgreitt enn, so vónandi ber til at finna eina skilagóða loysn, sum allir partar kunnu liva við, sigur Jóhan Dahl.



*Jóhan Dahl sigur seg hava gjørt sítt til, at finna eina loysn á málinum. Men enn hevur tað ikki borið til*